# – Hetta er tað størsta

**Ivar Lind Greiner er ikki í iva um, at hetta er tann besti sangurin, hann hevur skrivað til Melodi Grand Prix. Eftir nógar royndir eydnaðist tað honum umsíðir at vinna leygarkvøldið**

GRAND PRIX
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Tað var upprunliga ætlanin, at ein annar enn Tomas Thordarson Christensen skuldi framføra "Sig det´ løgn" .

- Eg sendi sangin inn við einum øðrum sangara, men hesin vildi heldur gera okkurt annað. Eg mintist Tomas frá Stjerne for aften og setti meg í samband við hann. Og tað hevur riggað ótrúliga væl hjá okkum báðum at samstarva, sigur Ivar Lind Greiner.

Tað er Ivar, sum hevur skrivað vinnandi sangin leygarkvøldið. Hann hevur nógvar ferðir áður skrivað sangir til Melodi Grand Prix, men hann er ikki eina løtu í iva um, at hesin sangurin er tann besti, hann skrivað til endamálið.

- Eg haldi, fólk verða so glað, tá tey hoyra hendan sangin. Hann er fullur av lívsgleði og góðum rútmum, sigur Ivar Lind Greinir.

Á tíðindafundi eftir at sigurin var staðfestur rósti Ivar Lind Greinir sangaranum, Tomas Thordarson upp um skýggja, og tað helt hann á við, tá Sosialurin fekk orða á hann seinni um kvøldið.

- Tomas ger hendan sangin góðan. Tað hann, sum ger, at vit vinna í kvøld. Hansara framførsla er ótrúliga góð, og tú merkir, hvussu hann livir seg inn í sangin, sigur Ivar Lind Greiner, sum heldur, at styrkin hjá "Sig det´ løgn" eru lívsgleðin í sanginum og tað, at er lagið upptempo, sum hann málber seg.

Og tað er góð kensla hjá einum tílíkum Grand Prix veterani umsíðir at vinna.

- Hetta er tað størsta. Hetta hevur alt at siga fyri meg, sigur Ivar Lind Greiner.

Vónirnar til kappingarnar í Turkalandi eru bara góðar. Har skal sangurin hjá Ivar fyrst í eina semifinalu 12. mai. Verður hann millum tey fyrstu tíggju, so sleppur hann at royna seg í sjálvari Eurovision Song Contest 15. mai.

Tá verður sangurin sungin á enskum. Hann fer tá at kallast "Shame on you". À góðum føroyskum: Skamma teg.

À donskum leygarkvøldið snúði sangurin seg um ein, sum ikki vildi trúgva, at hansara lívskærleiki var hon ótrúgvin, og øll vistu av hesum uttan hann. Í Turkalandi verður innihaldið eisini nakað í sama stíl.



*Ein ovurfegin Ivar Lind Greiner, eftir at virðislønin varð handað leygarkvøldið.*

*Mynd: Nicolai Lorenzen*

### Sonurin valdi

Upprunaliga gjørdi Ivar tríggjar sangir til ársins Melodi Grand Prix. Men hann hevur bert loyvi at senda ein inn. Avgerðin, um hvør av sangunum hóskaði seg best at senda inn, lat Ivar sín fjúrtan ára gamla son taka. Og sonurin var ikki í iva um, at Sig det´ løgn var tann besti, og tað kunnu feðgarnir fegnast um í dag.

Til dagligt livir Ivar av at gera tónleik til lýsingar. Hann hevur millum annað gjørt tónleikin til kendur Harry lýsingarnar hjá DSB.

Við Danmarks Radio hevur Ivar greitt frá uppskriftini at gera ein góðan Melodi Grand Prix sang. Hon er í trimum stigum: Tvey tey fyrstu skulu ganga skjótt fyri seg og fanga beinanvegin uttan ov nógv hóvasták, men tað síðsta krevur nógva tíð og orku. Tá snýr tað seg um at rigga sangin til og fáa alt upp á pláss. Ivar metir seg hava nýtt einar 150 tímar til at fáa hendan sangin lidnan.

At sangurin gjørdist so salsa merktur hevur nógv at gera við samstarvinum millum seg og Tomas Thordarson, greiðir Ivar frá.

Við sínum drúgvu royndum hevur Ivar upplivað nógvar Grand Prix kappingar. Men hann heldur ikki, at støðið hevur verið so høgt sum í ár. Burtursæð frá sínum egna, dámdi honum best sangin "Hvorend du går hen", sum Ditlev sang. Men eisini sangurin hjá føroysku Petsi fall í góða jørð hjá Ivar.

- Hon skal bara ringja, um hon hevur brúk fyri onkrum at skriva sangir til hana, sigur Ivar Lind Greiner.

# Vunnu fimta plássið

**Niels Drevsholt var ógvuliga væl nøgdur við fimta plássið og sín føroyska sangara**

GRAND PRIX
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

- Vit vunnu eitt fimta pláss. Niels Drevsholt, sum hevur skrivað Mest når det er regn, helt ikki, at fimta plássi hjá honum og Petsi kundi tulkast sum nakað annað enn ein sigur. Sangurin varð spáddur eitt møguligt fyrsta ella annað pláss, men songskaldið helt ikki, at tað var møguligt leygarkvøldið at vinna á salsarútmunum hjá Tomas Thorvaldssoni.

- Eg errin av úrslitinum og av Petsi. Hevur nakar ábyrgdina av, at sangurin ikki endaði longuri frammi, so er tað eg, sigur Niels Drevsholt.

### Heimurin opin

Niels Drevsholt, sum hevur nógvar roydnir at skriva sangir til Melodi Grand Prix, hevur sum vera mann nógv rósandi orð at siga um Petsi Tvørfoss.

- Tit eiga nakrar ótrúliga góðar sangarar í Føroyum, sigur Niels Drevsholt og sipar til, at føroyskir sangarar millum annað hava staðið seg framúr væl í donskum tónleikakappingum.

Um orsøkirnar til, at hann vildi hava Petsi at syngja hansara sang, sigur hann, at hon er eitt av teimum størstu talentunum, hann nakrantíð hevur hoyrt.

– Petsi sang hendan sangin betri, enn nakar annar hevði kunnað, sigur Niels Drevsholt.

Hann er sannførdur um, at møguleikarnir hjá Petsi eru nógvir í framtíðini.

– Heimurin liggur opin fyri hana. Hetta, tit hoyrdu í kvøld, var bert eitt lítið brot av tí, sum hon megnar. Hennara rødd er ógvuliga sterk, og hon megnar at syngja nógvar sjangrur, sigur Niels Drevsholt.



*Niels Drevsholt var errin av sínum sangi, Petsi og fimta plássinum leygarkvøldið.*

*Mynd: Nicolai Lorenzen*

Hann nevnir sum dømi, at tey hava sungið løg sum Nothing Compares to you, sum Sinead O´Conner er víðagitin fyri at syngja. Hennara sangurin er sera krevjandi fyri ein og hvønn sangara, men Petsi megnar at syngja hann næstan sum einki.

- Eg vil fegin samstarva meira við hana. Um tað verður í Grand Prix høpi veit eg ikki, men okkurt samstarv vóni at hava við hana, sigur Niels Drevsholt.

### Gera meira við tónleikin

Niels Drevsholt hevur ongantíð vunnið Melodi Grand Prix við einum av sínum sangum. Tvær ferðir er tað vorðið til eitt annað pláss. Men Niels hevur ongar ætlanir um at gevast á hondum nú.

- Eg haldi, at Melodi Grand Prix er nakað av tí stuttligasta at uppliva. Sjálvandi ætli eg mær at royna aftur og aftur, sigur ein glaður Niels Drevsholt, tá vit prátaðu við hann seint leygarkvøldið.

Hann hevur tað til felags við Ivar Lind Greiner, sum hevur skrivað Sig det´ løgn, at hann til dagligt fæst við at framleiða tónleik til lýsingar.

- Eg vóni at kunna nýta nógv meira tíð til at skriva tónleik næstu tíðina, sigur Niels Drevsholt.

Hann fegnast stórliga um, at danska Melodi Grand Prixið hevði eitt somikið høgt støði í ár. Hann heldur, at støðið møguliga var betri í ár enn nakrantíð áður.

- Tað var ómøguligt fyri meg at velja fimm finalistar út millum hesar tíggju sangirnar. Eg vildi fegin havt eini sjey ella átta av teimum í finaluni, sigur Niels Drevsholt.

Eftir at Melodi Grand Prix í Danmark hevur upplivað ógvuliga skiftandi undirtøku og eydnu seinastu árini, so er roynda songskaldið sannført um, at nú er Melodi Grand Prix komið aftur fyri at vera.

# ítróttur

Nr. 27 • týsdagur • 10. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nógvir kamelar skulu etast




*Dánjal Andreasen varð nýggjur FSF-formaður á aðalfundinum fyri tveimum árum síðani. Nú er líkt til, at hann skal stríðast hart fyri at halda fast um sessin*

**Sambært skrivinum, sum formaðurin fekk frá meirilutanum av nevndini, so er lítið høpi í nevndararbeiðinum í FSF. Men kortini er ein semja gjørd, har nevndin sigur seg leggja formansstríðið niður**

FSF-STRÍÐ
*Jákup Mørk*

Sjálvt brævið, sum varð sent Dánjali Andreasen tann 7. januar í ár, er væl drúgvari enn tað, sum framgongur aðra staðni á hesum síðum, men ákærupunktini í hesum eru klokkuklár.

Teir fýra nevndarlimirnir, sum hava skrivað undir brævið, siga seg als ikki kunna góðtaka arbeiðsháttin hjá verandi formanninum, og heita tí á hann um at umhugsa sína støðu. Í brævinum verður eisini staðfest, at nevndarlimirnir undrast á útmeldingina frá FSF-formanninum, tá hesin í november mánaði seg taka við afturvali, og minna eisini á, at enn er komandi aðalfundurin als ikki umrøddur á nevndarfundi. Tað vil millum annað siga, at nevndin tá als ikki hevði tikið støðu til, hvønn hon fór at peika á sum formansevni.

### Ikki bøtast uttan víðari

So klárt, sum hetta brævið er skrivað, so er einki at ivast í, at djúpar rivur hava verið í samstarvinum millum FSF-formannin og ein meiriluta av nevndini. Í summum førum somikið djúpar, at tær neyvan lekjast aftur í bræði, og so slettis ikki við einum skrivi upp á 10 reglur, sum verður sent feløgunum.

Hetta seinsta er annars júst tað, sum eftirfylgjandi er hent. Starvsnevndin segði seg týsdagin vera samda um at leggja stríðið niður viðvíkjandi formansstarvinum til aðalfundin, og at Rúni Heinesen sostatt tekur seg aftur sum formansevni.

Tær 10 reglurnar, sum vórðu sendar feløgunum, siga tó ikki so nógv um, í hvønn mun nøkur semja er fingin í lag. Einasta, sum partarnir tykjast vera samdir um, er, at greiðar mannagongdir fyri samskiftið við nevnd, undirnevndir, umsiting og limafeløg skulu gerast, og at skilnaður skal gerast í umsitingini millum ábyrgdina av bókhaldi og fíggjarligum flytingum.

Hetta seinasta hevur fingið mong at hveppast eitt sindur við, tí frammanundan er skilnaður millum flytingar og bókhald. Rúni Heinesen segði tó til hetta, at ætlanin við hesum einamest var at taka nakrar byrðar frá formanninum.

### Einaræðisharri

Eftir at brævið, sum varð sent Dánjali Andreasen er vorðið alment, tykjast fleiri av temum, sum vara av FSF standa við sama spurningi: Er tað veruliga so, at Fótbóltssambandið verður stýrt diktatoriskt av einum maktsjúkum formanni?

Heilt so galið er tað neyvan, men nógv í skrivinum bendir tó á, at týðandi mál fyri føroyskan fótbólt als ikki verða viðgjørd í nevndini.

Ikki minst er tað skelkandi lesnaður, tá tað stendur skrivað, at nevndin mest sum onga kunning fær í málum, sum snúgva seg um altjóða limaskapin hjá Føroyum, og at nevndin heldur ikki tekur støðu til, hvussu FSF skal greiða atkvøðu, tá altjóða fundir eru á skránni.

Hetta bendir í øllum førum tann vegin, at formaðurin einsamallur ger av, hvat FSF skal halda í slíkum førum, og onnur brot úr brævinum benda a sama bógvin. Sagt verður, at formaðurin er óliðigur, og at hann á ein ófantaligan hátt roynir at trumfa sín vilja oman yvir nevndina, tá mál verða viðgjørd.

Og so er tað heldur ikki altíð, at mál fáa nakra viðgerð. Eitt nú verður sagt, at prinsipiell mál fyri føroyskan fótbólt als ikki verða viðgjørd á nevndarfundum, og hetta má vera nakað, sum fær allar alarmklokkur at ringja.

Eitt tað størsta arbeiðið, sum FSF hevur framt hesi seinastu nógvu árini, er nevnliga ein miðvís menning av útbúgvingarøkinum, soleiðis at Føroyar í dag í nógv størri mun sjálvir hava tann kunnleika, sum er neyðugur í eitt nú fótbóltsvenjing og –fyriskipan. Er tað, sum er nevnt í skrivinum, rætt, so tykist hetta arbeiði nú at vera steðgað fullkomuliga upp, og tað vil so á ongan hátt koma føroyskum fótbólti til gagns.

### Forklárings-trupulleika

Og eftir stendur nú spurningurin, hvussu arbeiðslagið verður, tá aðalfundurin fyri 2004 er av. Verður tað so, at Dánjal Andreasen tá framvegis er formaður, tykjast teir nevndarlimirnir, sum hava sent brævið, og sum tá framvegis eru í nevndini, at hava ein stóran forkláringstrupulleika.

Skulu teir tá framhaldandi samstarva við einum formanni, sum teir ikki hava álit á, og sum teir ikki meta er rætti maðurin at stjórna Fótbbóltssambandinum, so tykist hetta krevja fleiri stór fet aftur eftir hæli og nógvar kamelar aftur við døgurðanum. Kanska var tað eisini hetta, sum varð gjørt, tá skrivið til feløgini varð sent út mikudagin.